## Torradagarnir nærkast

18. – 24. februar verða Torradagar í Klaksvík. Tiltakið var fyrstu ferð seinasta ár, og ætlanin er, at hetta skal vera eitt afturvendandi tiltak. Fleiri áhugaverdir fyrilestrar eru longu settir á skránna. Tann eina dagin heldur Bogi Hansen fyrilestur um veðurlagsbroytingar og veðurlagsárin, Hjalti í Jákupsstovu heldur fyrilestur um fiskireguleringar, og Alix Rasmussen, sum vit kenna eina best frá morgunsendingunum í Útvarpinum, fer at greiða frá hvussu veðurforsøgnirnar verða evnaðar til á veðurstovuni DMI, har hann arbeiðir





*Norðoyatingmaðurin, Karsten Hansen, er til reiðar til aftur at taka sær av fíggjarmálum, sum hann fyrr hevur gjørt í seks ár*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Karsten bjóðar seg fram

**Nógvar gitingar eru, men ongi eru nøvn sett á tey, sum skulu út í landsstýrið, tá ella um samgonga verður skipað millum C, E og H. Atkvøðustemmuslúkurin hjá Miðflokkinum sigur seg vera til reiðar at gerast fíggjarmálaráðharri**

SAMGONGUSAMRÁÐINGAR
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Í blaðnum í gjár gittu vit, hvørji hava bestu møguleikar at koma út í Tinganes og manna landsstýrið. Ein av teimum var Karsten Hansen, sum vendi Tjóðveldinum bakið í fjør og fór upp í Miðflokkin, eftir at 266 B varð samtykt eftir uppskoti frá tveimum tjóðveldistinglimum.

At byrja við vóru ikki nógv ið spáddu honum møguleika at koma innaftur, men við stórari undirtøku í sínum egna øki í Norðoyggjum og væl hjálptur av broytingini í valskipanini við einum valdømi, varð hendan metingin gjørd til skammar. Við smáum 1000 atkvøðum legði hann bæði Bill Justinussen og Jenis av Rana væl og virðiliga aftur um seg. Síðstnevndi var um reppið til ikki at verða afturvaldur.

Tað góða valið hjá norðoyatingmanninum hevur ivaleyst givið honum blóð á tonna um at sleppa at royna seg aftur í landsstýrinum. Karsten Hansen hevur eisini royndirnar á hesum øki, tí hann fyrr hevur røkt júst hendan sessin í seks ár.

Upp á spurningin um hann hevur ambitiónir aftur at koma at sita á landskassanum, sigur Karsten Hansen, at hann fer at taka av, um tilboðið kemur.

- Eftir nógv ár sum løgtingsmaður, býráðspolitikari og landsstýrismaður havi eg sum so onki at prógva, men fái eg tilboðið, so vænti eg, at eg fari at taka av. Men lat okkum fyrst fáa samgonguskjalið undirskrivað, sigur Karsten Hansen.

Sosialurin spáddi í gjár, at um Miðflokkurin fær fíggjarmál um hendi, so er helst lítið at ivast í, at Karsten Hansen fær sítt ynski uppfylt.

# Valla nøkur samgonga klár í morgin



*Sum skilst vænta sjálvt tey mest bjartskygdu tingfólkini ikki, at nøkur liðug samgonga er tøk, tá Løgtingið kemur saman í morgin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Tað verður neyvan nøkur samgonga klár, tá Løgtingið kemur saman fyrrapartin í morgin at góðkenna valbrøv og velja formannskap. Sjálvt um partarnir tykjast bjartskygdir, so er størsti knúturin fíggjar- og búskaparpolitikkurin, har javnvág ikki er fingin í útreiðslur og inntøkur. Støddin á blokkinum kann eisini koma upp á tvørs fyri eini semju**

SAMGONGUSAMRÁÐINGAR
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Hóast komnir væl áleiðis, so er framvegis óvíst, um samgongan komandi fýra árini verður millum Javnaðaflokkin, Tjóðveldi og Miðflokkin. Nógvir stórir knútar eru loystir, men á tí búskaparliga- og fíggjarliga økinum er í skrivandi løtu framvegis langt á mál. Tí er ósannlíkt, at nøkur samgonga er klár, tá Løgtingið kemur saman fyrrapartin í morgin at góðkenna valbrøv og velja formannskap.

Limirnir í eini nýggjari samgongu hava natúrliga nógv krøv og ynskir ella rættari sagt, vallyftir, sum skulu uppfyllast. Tí vilja hesi altíð verða munandi dýrari, enn tað sum búskapurin og fíggjarpolitikkurin loyvir. Soleiðis er eisini hesaferð, har ósemja tykist vera um, hvussu nógv skal latast í Samhaldsfasta, so pensjónirnar hjá láglønarbólkunum kunnu hækkast. Sama ger seg galdandi á barsilsøkinum, har krøv eru frammi um at hækka barsilsfarloyvið úr seks upp í 12 mánaðar, sum nøkur lond kring okkum longu hava gjørt. Tó skal hetta gerast stigvíst. Tjóðveldi krevur, at nógv skal setast av til gransking.

Tey mest bjartskygdu vóna, at samgonguskjalið so nøkunlunda er komið upp á pláss í morgin, men ongin væntar, at tað bæði er eydnast at býta málsøki og seta nøvn á tey, sum skulu manna landsstýrið komandi fýra árini. Væl lat merkja, um tað nú eydnast at skipa samgongu millum hesar tríggjar flokkarnar.